video/dvd 3arin fløgur

## e.t.



E.T hjá Steven Spielberg er nú endurúgivin á dvd. Hann er mastraður av nýggjum, umframt at við eru nógv ymiskt eyka tilfar, og eisini eru nógvar scenur við, sum ongantíð eru vístar áður.

E.T vann fýra Oscars og tvær Golden Globe viðrislønir – millum annað fyri besta film.

Klassikarin er nú komin út aftur. Um tað lítla burturvilsta rúmdardjkórið, sum er tríggjar milliónir ljósár heimanifrá.

Hetta er ein serlig 20 ára jubileumsútgáva í sambandi við, at 20 ár eru liðin síðani filmurin fyrstu ferð var at síggja.

## wired up 2

Nú er Wired Up 2 komin á marknaðin. Wired up er ein savnsfløga við bólkum, ið spæla harðari tónleik.

Á fløguni eru 20 skeringar við bólkum sum Linkin Park, Nickelback, Staind, Papa Roach, The Calling, P.O.D, Alien Ant Farm, Silverchair og Goo Goo Dolls.



Sangirnir eru nakrir av teimum, sum hava verið at hoyrt hjá bólkunum seinastu árini.

## the last castle



Tað er bæði stjørnudust og ótrútligt action, tá Oscar vinnarin, Robert Redford setur seg upp ímóti einum fongsulsstjóra í hesum aktion-thrillaranum. Hann tænti landi sínum og gjørdist ein hetja. Hann gjørdi eitt mistak og bleiv til ein fanga. Generalurin Eugene Irwin vil bara sita revsingina út – inntil hann uppdagar nakað sjokkerandi: hinir fangarnir verða allir dripnir – ein fyri ein. Nú má Irwin taka leiðsluna eina seinastu ferð og savna fangarnar saman í einum bardaga fyri at vinna yvir eini brutalari og korruptari skipan og vísa heiminum sannleikan.

## nirvana

So eru menninir úr Seattle aftur við eini fløgu. Sjálvt um forsangarin, Kurt Cobain, er deyður, so hevur bólkurin, Nirvana, nú latið eina savnsfløgu av hondum. 15 skeringar eru á fløguni. Og eru øll løgini nøkur av teirra kendastu. Nevnast kunnu millum annað About a Girl, Smells Like Teen Spirit, Rape Me og Where Did You Sleep Last Night.



Eisini er ein spildurnýggjur sangur á fløguni. Talan er um You Know You´re Right og hann er ongantíð útgivin áður.

## tracy.chapman\let.it.rain

Við "let it rain" hevur Tracy Chapman funnið eitt næstan fullgjørt grundarlag fyri hennara ótrúligu rødd. Hon og hjálparframleiðarin John Parish hava funnið ein bleytari framførsluhátt har gittarar og tamborinir runga ímillum einkultar rútmur. Kassagittarspælið ið hevur eyðkent Tracy Chapman, er skift út við upprunarútmur, við klappum, og bukan á tunnur, vaskibretti og so víðari. Ein meira negro-spiritual/gospel kendur framførsluháttur. Summar framførslur fara heilt yvir í tað spirituala, har røddir vera framførdar á ymsar undarligar háttir.
Alt í alt kann sigast at hettar fyrst og fremst er ein "lurtarafløga", og neyvan nakað ið fer at buldra á diskotekunum. Fløgan er djúp og kensluborin, og kann ein aftur við ein glasi av reyðvíni lættliga blíva rivin við, av hesi ótrúligu rødd, hvørs framførsluháttur rørir djúpt við hjartastreingirnar.

### fakta:

| | |
|---|---|
| bólkur/einstaklingur: | tracy chapman |
| heiti á útgávu: | let it rain |
| útgávudato: | 21. oktober 2002 |
| skeringar á útgávu: | 12 |
| longd á útgávu: | 41.58 min |
| framleiðari: | john parish og tracy chapman |
| útgávufelag: | warner |

meting:

| | |
|---|---|
| ljóðgóðska: | ●●●● |
| dygd í løgum: | ●●●● |
| heildarmeting: | ●●●● |




### topp.10/fløgur

01. ymiskt/popp list
02. ymiskt/wired up 2
03. ymiskt/woman 5
04. ymiskt/millennium III
05. ymiskt/now 1
06. christina aguilera/stripped
07. eminem/the eminem show
08. nirvana/nirvana
09. ymiskt/hartbeat 2
10. eivør pálsdóttir/eivør

### topp.10/DVD

01. ice age
02. the last castle
03. e.t.
04. we were soldiers
05. time machine
06. black hawk down
07. out cold
08. mission kleopatra/asterix og obe..
09. greven af monte cristo
10. collateral damage

### topp.10/playstation.2

01. fifa football 2003
02. hitman II/silent assassin
03. need for speed/hot pursuit 2
04. the thing
05. grand theft auto 3
06. blade 2
07. time splitters 2
08. onimusha 2/samurai's destiny
09. commandos 2
10. dino stalker

### topp.10/pc.spøl

01. fifa football 2003
02. the sims/unleashed
03. hitman II
04. mafia
05. battlefield 1942
06. the sims/deluxe edition
07. heroes IV/the gathering storm
08. empire earth/the art of conquest
09. grand theft auto 3
10. medievil/total war

3arin

ítróttur

Nr. 213 • mikudagur • 6. november 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Avsmurdir



*Føroyingarnir høvdu nógv at hugsa um, tá Kolumbia var mótstøðuliðið mánadagin, og tá samanum kom, vóru okkara væl og virðiliga við undirlutan*

## Óstøðuga gongdin hjá føroyska talvlandsliðnum heldur fram í Bled

TALV-OL
*Jákup Sørensen*

**Bled:** Seinastu tríggir dystirnir hava verið sera ójavnir. Fyrst eitt 3-1 tap móti Eysturríki, síðani ein 3,5-0,5 sigur móti IPCA og mánadagin eitt lemjandi 3,5-0,5 tap móti Kolumbia.

Gamaní hava bæði Eysturríki og Kolumbia verið nógv frammanfyri Føroyar í styrkismetingini, men føroysku telvarnir høvdu kortini ætlað sær nógv betri úrslit enn hesi.

Føroysku telvarnir ætlaðu sær at halda frídagin sunnudagin uttan at gera nakað serligt burturúr telvingini, men tá ið Kolumbia kom undan kavi, sum mótstøðulið vóru fleiri sum ætlaðu sær at fyrireika seg til góðu mótstøðuni.

Um tað hjálpti er ringt at siga, tí føroyingarnir vóru stutt og greitt avsmurdir. Einasta undantakið, var sum vanligt John Rødgaard. Hann hevði svarta fólkið og knógvaði einum javnleiki.

### Truplar uppgávur

John Arni Nilssen, hevði stórmeistaran Alonso Zapata ímóti sær, hann hevur styrkitalið 2556. Hann hevur telvað 8 talv í kappingini og hevur enn einki tapt. Avrikið hjá honum svarar til meiri enn 2700 í rating. John Arni var kortini hugagóður og telvaði sum ein brandur.

Flestu føroysku telvarnir hildu at tað stóð rættuliga væl til hjá honum, men so burturúr púra ongum vendi Zapata talvinum í einum leiki. Tað tóktist sum um bæði John Arni og alt føroyska liðið mistu flogið av hesum. Teir sóu allir eitt sindur brúnasíðir út, har teir sótu yvir av suður amerikanskum macho monnum, sum rættuliga duga at vera bringubrattir, tá ið tað krevst.

Heini Olsen var kroystur í talvinum, men helt seg so leggja ráðini í dugdu. Væl vitandi um, at ætlanin annaðhvørt fór at røkka ella støkka. Hjá Heina gekk ikki og enn eitt 0 kom á máltalvuna.

Martin Poulsen telvaði eitt sera vakurt og gott talv móti IPCA, og tí var eingin ivi um at hann skuldi vera á liðnum móti Kolumbia. Men hjá honum gekk sera illa í hond. Hann sá ikki avgerðandi leik hjá mótstøðumanninum og var settur mát, áðrenn nakar vardi.

Føroyar hava nú 17,5 stig av 36 møguligum og eru nú aftur niðanfyri tey 50%

Føroyar skulu í 10. umfari royna at koma fyri seg eftir stórtapi, men uppgávan gjørdist lítið lættari enn móti Kolumbia. Mótstøðuliðið er Kyrgisa, sum er styrkismett sum nummar 63. Fremsti telvarin hjá teimum hevur omanfyri 2500 í rating.

### John Arni normmøguleika

Danski dómarin Mogens Nielsen, sum javnan er í Føroyum í samband við kappingar hevur roknað út, at John Arni enn hevur møguleikan at ogna næsta IM normin. Til tess krevst at hann fær 1,5 stig í teimum báðum næstu talvunum hann telvar. Harafturat krevst at mótstøðan í talvunum báðum hevur miðalratingina 2367.

### Deild fyri tey lítlu londini

Tey smáu limalondini í FIDE altjóða talvsambandinum stovnaðu mánamorgunin felagsskap, sum skal hjálpa teimum at vinna sær betri rættindi í FIDE felagsskapinum.

Stigið til hetta tiltakið var tikið av talvsambandinum í Andorra. Formaðurin í Talvsambandi Føroya, Rani Nolsøe umboðaði Føroyar á fundinum.

Ætlanin er, at tey smáu sambondini skulu samstarva um ymiskt, sum er felags fyri tey. Smá lond eru í hesum høpinum eru lond, sum hava minnið enn eina millión íbúgvar.

Hvørji tey felagsmálini skulu vera er enn ikki nøkur avgerð um, men eitt av høvuðsmálunum verður at syrgja fyri, at **tey mongu sjálvstø´randi londini ikki ver**a tveitt úr talv olympiaduni, tá ið hon gerst ein partur av annaðhvørt vetrar ella summar olympiaduni. Umframt tað skal felagsskapurin syrgja fyri, at teir nógvu pengarnir sum renna gjøgnum skipanina í FIDE og sum helst vera fleiri eftir vanligu olympiaduna eisini skulu koma teimum lítlu londunum til góðar.

# Frá Talvolympiaduni

**Talvið í dag er tikið úr Talv-Ol, sum í hesum døgum verður telvað í Bled, Slovenia**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Talvið hesa vikuna er vakra talvið hjá John Arna Nilssen úr 8. umfari í Talvolympiaduni í Bled, Slovenia. Føroyar vunnu í hesum dysti stórsigur á liðnum hjá talvsamgonguni fyri teimum rørslutarnaðu, sum vóru styrkismettir nakað framanfyri føroyingar. Kortini gjørdu vit bart og vunnu heili 3,5 – 0,5. Umframt John Arna vunnu Heini Olsen og Martin Poulsen, meðan IM John Rødgaard leikti javnt.

Mánadagin fingu føroyingar harða viðferð frá Kolumbia. Bert John Rødgaard fekk stig við sínum javnleiki, og harvið bjargaði hann okkum frá einum 4-0 skrædli. Týsdagin varð mótstøðuliðið Kyrgiztan, sum er væl hægri styrkismett enn føroyska liðið.

John Arni Nilssen (2385) - Andrei Obodchuk (2423)
OL Bled 2002 (8), 02.11.2002

1.d4 d5 2.c4 c6 3.Ric3 Rif6 4.e3 e6 5.Rif3 Ribd7 6.Bd3 dxc4 7.Bxc4 b5 8.Be2 Bb7 9.0-0 a6 10.e4 c5 11.d5 (tann skarpi varianturin í hesaru byrjan) exd5 12.e5! (John Arni luktar blóð! Okkara fyrsta borð finnur nú góða kombinatión) Rig4 13.e6 fxe6 14.Rig5 (e-finnan og riddarin á g4 hjá svørtum eru málini) Rigf6 15.Rixe6 Fb6 16.Re1! Kf7 17.Bf3 d4 18.Rid5! Fa7 [18...Rixd5 19.Bxd5 og hvítur vinnur vegna sína aktiva støðu. t.d: 19...Kg8 20.Ff3 Bxd5 21.Fxd5] 19.Rig5+ (John Arni fer eftir mátinum, sum er djarvt, og sjálvt um Rig5+ kanska ikki heilt er rætti leikurin, so kennir svartur seg somikið kroystan at hann leikar óneyvt) Kg8 20.Ric7 h6? [20...Bxf3 21.Fxf3 Rb8 22.Ff5 Rb6 tykist at kundi verið bjargingin hjá svørtum] 21.Bg4! hxg5? [21...Rixg4 22.Fxg4 er sjálvsagt betri hjá svørtum, men hvítur hevur kortini munin] 22.Fb3+!



nú verður mát, ella nógv materiali til John Arna. t.d c4 23.Be6+ Kh7 24.Fh3+ Kg6 25. Ff5+ Kh6 26.Bf7. Eitt sera gott talv, men tíverri mátti John Arni lúta í níggjunda umfari móti einum stórmeistara úr Kolumbia. 1-0

### Úrslit í 9. umfarinum

| | |
|---|---|
| John Arni Nilssen GM Alono Zapata (2556) | 0-1 |
| John Rødgaard - IM Dario Alzate (2432) | 0,5 - 0,5 |
| Heini Olsen - IM Raul Henao (2384) | 0-1 |
| Martin Poulsen - Mauricio Uribe (2364) | 0-1 |

## Komandi dystir

**Hondbóltur**
**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 06.11 | 18.30 | StÍF-Neistin |

**1. deild menn**

| | | |
|---|---|---|
| 06.11 | 20.00 | StÍF-Neistin |
| 06.11 | 20.00 | Tjaldur-KÍF |
| 06.11 | 20.00 | VÍF-Kyndil |